**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 921, **Sp/f Byggifelagi› K.S.O., 900 Vágur.**

**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Poul Bryjolf Kristiansen, 900 Vágur (forma›ur), Sølvi Tórgrím Brynjolfsson Kristiansen, 900 Vágur, Gudfinn Øystein Olsen, 950 Porkeri, Helgi Brynjolfsson Kristiansen og Jonny Eydna Brynjolfsdóttir Kristiansen, 950 Porkeri.
**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Gudfinn Øystein Olsen, 950 Porkeri.

Felagi› er fari› í likvidatión vi› Alfred Petersen, advokati, Postbox 164, 110 Tórshavn sum likvidator.

Skráseting Føroya tann 8. februar 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 2954

**Navn:** Sp/f Úrvalsbilar
**Adressa:** Borgartún 1,160 Argir

**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 13.12.1999
**Vi›tøkudato:** 13.12.1999
**Kapitalur:** Kr. 110.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kr. 110.000,00 í ø›rum vir›um til kurs 100.
**Stovnarar:** Herman Johan Dam, Borgartún 1, 160 Argir og Magnus Onghamar, M‡risnípuvegur 24, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Herman Johan Dam, Borgartún 1, 160 Argir og Magnus Onghamar, M‡risnípuvegur 24, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur tekna› av stjórunum saman.
**Grannsko›ari:** : P/F Grannsko›aravriki› Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 13.12.1999 - 31.12.2000
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga og reka bilsølu, verksta› og anna› starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 8. februar 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 29, **Sp/f Thomas Dam & Co., 100 Tórshavn.**

**Vi›tøkur broyttar:** 22.12.1999.
**N‡tt navn:** P/F Thomas Dam & Co
**Kapitalur:** Hækking vi› kr. 7.195.000,00 til kr. 7.500.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 7.195.000,00 vi› grunshækking
A: Partabrøv kr. 5.000.000,00 og B: Partabrøv kr. 2.500.000,00
**Nevnd:**
Farin frá sum forma›ur: Meinhard Danberg Dam, Argjavegur 55, 160 Argir.
Innkomin sum forma›ur: Jógvan Pauli Dam, Argjavegur 3, 160 Argir.
Farin úr nevndini: Torfinn Dam, Argjavegur 23, 160 Argir.
Innkomin í nevndina: Thomas Dam, 650 Toftir og Johanna Elisabeth Dam, Ryggsgøta 2, 160 Argir.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur tekna› av stjóra, nevndarformanni, tveimum nevndarlimum í felag ella av allari nevndini.

Skráseting Føroya tann 8. februar 2000

Kristin Balle

---


# 32 tons útróðrarbátur

sum hevur snelluloyvið í Íslandi og fiskidagar í bólki 4a, til sølu um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 214949 ella 288473**



# Handverkari søkist

Til kaðal- og linjuarbeiði v.m. hjá SEV í Suðuroy verður søkt eftir einum fólki við sveinabrævi sum elektrikari ella við aðrari viðkomandi handverkaraútbúgving.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til SEV í Vági, tlf. 373016 ella til SEV í Tórshavn, tlf. 311366.

Umsóknir um prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til Elfelagið SEV, Landavegur 92, Postrúm 319, 110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 1. mars 2000.

**Elfelagið SEV**



# *Rakstrarleiðari á Statoil*

**Til rakstrardeild okkara søkja vit eftir leiðara**

**Starvið**
Sum rakstrarleiðari fært tú dagligu ábyrgdina av øllum rakstrinum hjá Statoil Føroyar. Starvið umfatar handfaring av oljuúrdráttum, tað verið seg móttøku, goymslu og víðari flutning til brúkaran.
Eisini umfatar starvið menning av deildini, soleiðis at brúkarin fær bestu tænastu skipa eftir dagførdum mannagongdum.

**Høvuðsuppgávur**
- At skipa flutningin av oljuúrdráttum til viðskiftafólk okkara.
- At verða dagligur leiðari hjá starvsfólkum okkara á rakstrardeildini.
- At leggja til rættis innkeyp av oljuúrdráttum herundir avgreiðslu av tangaskipum.
- At samskipa arbeiði á goymslum okkara.
- At gera mánaðaruppgerðir á goymslum okkara.
- At hava ábyrgdina av útreiðsluætlanum hjá rakstradeildini.
- At hava ábyrgdina av, at allar ásettar rakstar-, trygdar- og umhvørvisskipanir verða fylgdar.
- At útbúgva starvsfólk og menna verandi skipanir.

**Vit bjóða**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði við góðum møguleikum fyri persónligari menning.
Møguleikar eru eisini at dagføra royndir á rakstrarstøðum hjá Statoil uttanfyri Føroyar og at luttaka á skeiðum innan samtakið.

**Førleiki**
Nýggi rakstrarleiðarin skal verða ágrýtin, framtakshugaður og duga væl at samstarva við viðskiftafólk og starvsfelagar.
Royndir sum leiðari, at nýta teldu og at handfara oljuúrdráttir geva fyrimun.

**Setunarviðurskiftir**
Rakstrarleiðarin er partur av leiðarabólkinum og hevur beinleiðis tilvísing til leiðslu felagsins.

Lønin verður sett eftir útbúgving og royndum.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

**P/f Statoil Føroyar,**
**att. Niels Juel Nattestad,**
**Postboks 3098, Viðarnes,**
**FO-110 Tórshavn, innan 21. febr.**

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

*Endamálið hjá Statoil Føroyar er at veita brúkarum kring landið oljuúrdráttir og aðrar vørur. Fyri Statoil Føroyar arbeiða uml. 150 fólk. Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og tænastu. Umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eisini eitt av okkara fremstu málum.*

**STATOIL**

***- fyri viðskiftafólk okkara***


**TVINGSILSSØLA**

**Hósdagin**
**tann 2. mars 2000**
**kl. 09.15**
verður á Dómaraskrivstovuni C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **ognina matr. nr. 265 a, Vágur (AS nr. 53/1999).**

Sambært tryggingarskjalinum, umframt skráseting, er talan um eini sethús uml. 56 $m^2$ gjørd úr betong, klædd við plastikki og takt við sementasbest.

Húsini hava 3 hæddir.

Kjallarin er óinnrættaður.

Á miðhæddini er ein køkur, ein stova, eitt kamar og ein gongd.

Á loftshæddini eru fýra kømur, ein gongd og eitt wc v/brúsukabinu.

Á grundøkinum uttanum húsini stendur eitt lítið høsnarhús.

Vindeyguni eru í vánaligum standi, men eru húsini í hampuligum standi.

Tvingsilssølan er umbiðin av **Advokatfelagnum, Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260 (sak nr. 43358-01)**, sum kann geva nærri upplýsingar um ognina og sum nærri avtala kann gerast við, um ynski er at síggja ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 7. feb. 2000*




# Frá Miðvágs Arbeiðarafelag

Aðalfundurin verður 25. februar.

**Nevndin**



# Sosialistiskt Ungmannafelag & Unga Sambandið

skipa fyri almennum fundi á Parnassinum á Hotel Hafnia leygardagin 12. feb. kl. 14.00

**Evni:**
**Útbjóðing av almennum ognum**
**Miðsavnan & miðspjaðing**

**Orðstýrari: Ólavur Ellefsen**

Gestir á fundinum verða umboð fyri tingmanning Javnaðarfloksins og Edmund Joensen fyri Sambandsflokkin.

Øll eru vælkomin

Sosialistiskt Ungmannafelag & Unga Sambandið



# *High School og Au-pair*

*Upplýsandi fundur um High School og Au-pair uppihald í útlandinum verður á Landsbókasavninum 12. feb.*

*Foreldur og systkin kunnu vera við.*

*STS High School kl. 13.30.*

*STS Au-pair kl. 15.00.*

Sosialurin - 311820

**STS** ***STS High School og Au-pair***
*Føroya umboðið*
*tel. 318805*



# BILSMIÐULÆRLINGUR SØKIST

**Søkt verður eftir lærlingi. Koyrikort og CIT prógv ein fyrimunur, tó eingin treyt.**

Skrivlig umsókn til:

**P/f D. B. Bilar**
**Jónas Bronchsgøta 15**
**100 Tórshavn**

**D. B. Bilar**
Tel. 310 600



Dr. Ingridar Meinigheits Barnagarður søkir

# Leiðara

at byrja 15. mai í ár.

Leiðarastarvið er eitt fulltíðarstarv. Umsøkjari má hava góð samstarvsevni og duga at verða andlitið hjá stovninum úteftir. Dentur verður lagdur á, at leiðarin er røkin og førur fyri at taka avgerðir, hevur virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum, og dugir at geva bæði børnum og starvsfólkum íblástur.

Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur og er normeraður til 60 børn í aldrinum 3 til 7 ár. Á stovninum arbeiða 20 fólk íroknað húsavørð og reingerðarfólk. Flestu av hesum arbeiða niðursetta tíð.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal verða stovninum í hendi áðrenn 1. mars.

Nærri fæst at vita við at venda sær til leiðaran á tlf. 312253.

**Dr. Ingridar Meinigheits Barnagarður**
J. Paturssonar gøta 13 • 100 Tórshavn



Dr. Ingridar Meinigheits Barnagarður søkir

# Pedagog

til 1. august í ár.

Starvið er 30 tímar á eini stovu við 20 børnum í 3 til 7 ára aldri. Tað sum dentur verður lagdur á er, at tú hevur umsorgan fyri barninum og dugir væl at samstarva.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal verða stovninum í hendi áðrenn 1. mars.

Ynskir tú at vita meira um starvið, kanst tú ringja tlf. 312253.

**Dr. Ingridar Meinigheits Barnagarður**
J. Paturssonar gøta 13 • 100 Tórshavn



# SUBARU 4.WD við skaða

**Ein sera vælhildin Subaru 1.8 GL Sedan, 4. hjólstrekk, reyður, 260.000 km., árg. jan. '89 við skaða til sølu.**

**D. B. Bilar**
Tel. 310 600



**Landssjúkrahúsið**
**FO-100 Tórshavn**

# Sjúkrasystrar

**til Onkologiska amb. á Landssjúkrahúsinum**

Á Onkologiska Ambulatoriinum á Landssjúkrahúsinum eru 2 størv á 0,5 tíð leys til setan skjótast gjørligt.

Arbeiðstíðin er eftir avtalu.

**Arbeiði umfatar:**
Vanligt ambulatoriivirksemi, viðtalur bæði persónligar og telefoniskar. Samskipan av onkologiska virkseminum á Landssjúkrahúsinum. Samskipan av tiltøkum í samband við vitjan av onkologiskum konsulentum frá Ríkissjúkrahúsinum. Tætt samstarv við med. og kir. seingjadeildirnar. Møgulig undirvísing av starvsfólkum.

Umsøkjarin skal vera sjúkrasystir við eftirútbúgving innan onkologiska sjúkrarøkt. Hava góð samstarvsevni. Áhuga fyri menning og undirvísing innan øki.

Løn- og setunartreytir sambært sáttmála millum Sjúkrasystrafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Onkologiska ambulatorium millum kl. 9.00 -13.00, tlf. 313540 lok. 214.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum skal sendast til Almanna- og heilsumálastýrið, Starvsfólkadeildin, Eirargarður 2, 100 Tórshavn.

Umsóknarfreist: 25. februar 2000, kl. 14.00

**Almanna- og heilsumálastýrið**
**Starvsfólkadeildin**
**Eirargarður 2**
**FO-100 Tórshavn**



# Bilar við stórum skaða til sølu

**Daihatsu Charade CS 1.0 diesel, árg. 1987**

*og ein*

**Merzedes Bens 190 D árg. 1986**

**TRYGD**
Tel. 214478



# Góð mold fæst

**Tlf. 215921 ella 315921**